# Vit kunnu øll at renna dyst

**Nakrir av luttakarunum á norðurlendsku leguni fyri rørslu- og menningartarnað, sum er í Føroyum í hesum døgum, kappaðust hósmorgunin í fræslum ítrótti á Svangaskarði**



Tey í koyristóli stóðu onki aftanfyri hini. Tey kappaðust í slalom

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Ingrid Bjarnastein*

**Svangaskarð:** Hóast veðrið ikki var av tí allarbesta hósmorgunin, so møttu luttakararnir, sum skuldu kappast í fræslum ítrótti fjølmentir upp á Svangaskarði. Regn og vindur var, men hetta tóktist ikki at nerva tey, tí tey vóru væl ílætin í regnklæðum og húgvum, so har var lag á manni at kappast.

Tað vóru børn frá norðurlendsku leguni fyri rørslu- og menningartarnað, sum høvdu leitað sær inn í Eysturoynna hósmorgunin. Legan byrjaði fríggjadagin í seinastu viku, og seinastu dagarnar hava fleiri kappingar verið á skránni.

## Gott lag

Lagið var ógvuliga gott á teimum nógvu luttakarunum. Nøkur tosaðu føroyskt, onnur íslendskt og norskt, svenskt og danskt var eisini at hoyra.

Fleiri hjálparfólk vóru eisini við, og tá klokkan nærkaðist hálvgum tíggju vóru tey um at vera klár at byrja. Lagt varð út við at hita upp. Tað hoyrir til hjá einum og hvørjum ítróttarfólki, og á Svangaskarði stóðu tey ikki nakað aftanfyri okkara mætastu ítróttarfólk. Hjá onkrum skuldi lag leggjast á, og skjótt høvdu tey flestu runnið seg heit, meðan onnur høvdu hoppað eitt sindur.

Byrjað varð við 100 metra renning. Talan var um seks sokallað heat, har millum fimm og seks vóru í hvørjum heati. Og so skjótt floytan hevði ljóðað, so varð lagt til brots. Tað var skjótt, at tey fyrstu heatini vórðu avgreidd.

Seinni út á fyrrapartin varð kappast í kúluvarpi, slalom fyri tey í koyristóli, Longdarlopi, 400 metra renning og bóltkasti.

Luttakararnir høvdu matpakka við, og høvdu tey høvi at fara inn í B68 húsi at bíða, meðan kappingarnar vóru.

Men tað var ikki bara í frælsum ítrótti, at kappast varð. Borðtennis, svimjing og boccia var eisini kappast í, men hetta fór ikki fram á Svangaskarði, men í Hoyvík.

Legan fyri rørslu- og menningartarnað hevur verið í eina viku, og hon endar í dag, fríggjadag. Hon verður hildin á øðrum hvørjum ári í teimum ymsu norðanlondunum, og er hetta aðru ferð, at hon verður hildin í Føroyum. Eini 120 luttakarar eru við á leguni.



*Fyrst á skránni hósmorgunin var 100 metra renning. Fyrsta heatið vann Rannvá Strøm úr Føroyum*





*Fleiri føroyskir luttakarar vóru við í frælsum ítrótti á Svangaskarði hósmorgunin*



*Meðan runnið varð, vóru hini óføre at "heppa" tey, sum runnu*



# Lýggjari veður næstu 100 árini



*Tey flestu síggja helst sól og glaðar dagar fyri sær, tá tey hoyra, at tað verður heitari veður í Føroyum. Men serfrøðingar siga, at tað gongur út yvir plantu- og djóralívið.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Miðalhitin í Føroyum og havinum kring Føroyar fer at økjast við trimum hitastigum fram til 2100. Tað merkir helst, at vit fáa eitt minni fjølbrott djóra- og plantulív í framtíðini, stendur í einari umhvørvisfrágreiðing, sum danska umhvørvisstýrið hevur gjørt**

UMHVØRVI
*Ingi Rasmussen*

Veðrið í Føroyum verður lýggjari, og avfallið um veturin verður meiri.

Tað stendur í einari drúgvari frágreiðing, sum viðvíkur veðurlagsbroytingum í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Frágreiðingin er gjørd av danska umhvørvisstýrinum í sambandi við, at Danmark hevur bundið seg til Kyotosáttmálan.

Veðurlagsbroytingarnar standast av dálking og í so máta hava vit einki at erpa okkum av. Ein frágreiðing frá Heilsufrøðiligu starvsstovu staðfesti í fjør, at vit hava triðhægsta útlátið í øllum heiminum av koltvíiltu fyri hvønn íbúgva.

Ein ST-frágreiðing um veðurlagið frá 2001 sigur, at menniskjan ávirkar náttúruna og veðurlagið í størri mun enn higartil hildið. Frágreiðingin vísir, at upphitingin av jørðini seinastu 50 árini helst er skapt av menniskjum. Prógvað verður, at veðurlagið er broytt í 20. øld og stórar broytingar eru í væntu næstu 100 árini eisini.

Sambært nýggju donsku frágreiðingini fer hetta eisini at henda hjá okkum.

## Heitt og vátt

Árligi miðalhitin í Føroyum fer at hækka trý hitastig fram til 2100, sigur frágreiðingin. Hækkingin í hitanum hendir stórt sæð javnt býtt út á summar og vetur.

Samstundis kunnu vit vænta, at avfallið um veturin fer hækka umleið 25 prosent, men ongar stórvegis broytingar henda um summarið hesum viðvíkjandi.

Tað ljóðar kanska ikki av nógvum, men hetta fær stóra ávirkan á djóra- og plantulívið, serliga í sjónum, sum sigst vera okkara hjallur. Tað, at Føroyar liggja avbyrgdar í Atlantshavinum, kann merkja, at broytingar í plantu- og djóralívinum, sum standast av veðurlagsávum, vera uttan javnvág.

Tað vil siga, at tað ikki er vist, at deyðin av summum djóra- og plantusløgum verður uppvigaður av nýggjum sløgum, sum tað ofta sæst aðrastaðni. Altso verður minni fjølbroytt djóra- og plantulív um okkara leiðir, um forsøgnin heldur.

## Skaðin í havinum

Størstu broytingarnar henda helst í havinum, hóast óvissan eisini er størst her, so leingi lagnan hjá Norðuratlantiska streyminum ikki er kend.

Ávirkanin á plantuæti verður stór. Stórur vandi er fyri fiskasløg, sum gýta á grunnum sjógvi tíðliga á vári, tí tey vera fyri UV-B stráling, sigur frágreiðingin. Talan er um eitt nú flatfisk, steinbít og onnur fiskasløg, hvørs rogn og ormverur reka til havs.

Ávirkanin á súgdjór í havinum og havfuglar verður serliga, at føðin verður at finna aðrastaðni, reiðring og uppvøkstur verða flutt, og at hægri tal av sjúkum fara at síggjast.

Toskurin sleppur neyvan undan heldur. Afturvendingin av toskinum sær út til at vera treytað av tí, sum hendir við havstreymunum. At tað til dømis hava verið fleiri stormar enn vanligt, hevur áður ført til, at fiskaynglið er blást til havøki, sum vóru ov køld til, at yngulið yvirlivdi. Ein niðurgongd í streyminum úr suðri ávirkar eisini føðina til fiskayngul.

## Hóttan í álvara

Hóast nógvar óvissur eru tengdar at slíkum forsøgnum, so vísa tær helst, at menniskjuni, sum skapa yvirupphitingina av jørðini, mugu gera sær greitt, hvat tey vilja. Tað hava eitt nú tikið danir til eftirtektar við at skriva undir Kyoto-sáttmálan, sum føroyingar enn ikki hava tikið undir við.

– Eingin veit við vissu, hvussu umfatandi veðurlagsbroytingarnar gerast frameftir. Men hinvegin kann eingin í dag ivast í hóttanini frá veðurlagsbroytingum á menniskju og umhvørvi, bæði í fátæka og ríka partinum av heiminum. At taka hóttanini í álvara er vorðin ein fortreyt fyri at náa einari burðardyggari menning. Danska stjórnin tekur hóttanina um globalu broytingarnar í fullum álvara og fer at liva upp til sínar altjóða bindingar, sigur Hans Christian Schmidt, umhvørivsmálaráðharri, í fororðinum til frágreiðingina, sum kallast Danmarks Tredje Nationalrapport.

Spurningurin er, um føroyingar taka hóttanina í álvara.

### Fakta

**HITI:** Miðalhitin í Tórshavn er í dag 6,5 hitastig. Hitin í januar og februar er umleið 3,5 hitastig og umleið 10,5 hitastig í juli. Árligi hitin er ymiskur frá staði til stað og er lægst við Vága floghavn, umleið 6 stig, og hægst á Sandi, har hann er 7 stig. Hitin er bert lítið hækkaður í 90-árunum.

**REGN:** Tað regnar illa í Føroyum. Eini 1284 mm. Mest í Hvalvík, har tað eru 300 regndagar. Í Tórshavn eru 273 regndagar. Avfallið er nógv hækkað síðan 1970-árini.

**SÓL:** Árligi sóltímarnir í Tórshavn eru gjørdir upp til 840 tímar. Sólin sær mest í maj og juni, 125 tímar í miðal. Hægst málda sóltímatalið var í maj 1948 og maj 2000. Talið av sóltímum síðstu 20 árini hevur verið javnt.

Kelda: Danmarks Tredje Nationalrapport. Under de Forenede Nationers Rammekonvention om klimaændringer. Miljøstylsen, Miljøministeriet. (Fæst á www.hsf.fo)